# Magnus Heinason – Túrfrágreiðing
# Yvirlitstroling – djupt. Túrur nr. 2040
# 23/9-29/9-2020

**Fólk við frá Havstovuni:** Jens Arni Thomassen, Heri Kallsoy, Mourits Mohr Joensen, Sigvald Kristiansen, Helga Bára Mohr Vang (toktleiðari)

**Ábyrgd:** Lise Helen Ofstad

**Endamál:** Høvuðsendamálið við túrinum var at kanna botnfisk á djúpum leiðum. Áherðsla varð løgd á at kanna m.a. brosmu, blálongu, gulllaks, stinglaks, langasporl, trantkongafisk og svartkalva. Hitin við botn varð skrásettur.

**Reiðskapur:** Stjørnutrol við 40 mm meskavídd í posanum, rockhopper grunnur, 120 m breitlar og Vágslemmar. Miniloggarar.

**Um túrin:** Vit fóru av Havnini mikudagin 23/9 kl. 13. Vit byrjaðu at taka støðir í ein landsynning úr Munkagrunninum kl. 21 mikukvøldið. Tað var gott veður og 24/9 høvdu vit longu tikið 8 støðir tilsamans. Tá vóru vit komin á Wyville Thomsen ryggin. Har hildu vit fram fríggjardagin 25/9 men seinnapartin bleiv verri veður so vit muttu liggja bakk í einar 6 tímar. Vit sigldu so norð eftir, á djúpri partin av Føroyabanka og leygardagin 26/9 var aftur sera gott veður og vit fingu 9 støðir tann dagin. Sunnudagin 27/9 royndu vit í ein útsynning úr Mykinesi men vórðu noydd at steðga kl. 18 sunnukvøldið vegna veður. Vit lógu bakk kl. 3 mánamorgunin 28/9 og náddu at taka 5 støðir áðrenn vit vóru noydd at steðga og sigla inn á Havnina. Vit vóru á Havnini týsmorgun kl.
Tað bleiv fast einar tríggjar ferðir á túrinum men gekk skjótt og væl í øllum førum at fáa leyst aftur.

**Prøvatøka:** Veiðan varð viðgjørd sambært kanningarætlanini og Sýnishondbókini. Yvirlit yvir veiðu, nytrur og magar (Talva 1) er víst niðanfyri. Búningarstigini til botnfisk (bústig 1-7, talva 4.4.1 í Sýnishondbókini) vóru brúkt fyri øll fiskasløg, undantikið gulllaks (bústig 1-7, egin), kongafisk (bústig 1-4, talva 4.4.3), langasporl (bústig 1-4, talva 4.4.5), havtasku (bústig 1-5, egin) og stinglaks (bústig 1-5, Gordon et al. 2000).

**Nær eru prøvarnir upparbeiddir:** Miða ímóti at alt er klárt í seinasta lagi 1. desember 2020.

**Fyribilsúrslit:** 59 ymisk fiskasløg vórðu skrásett. Av tí at túrurin í ár bert gjørdist helvtina so langur sum ætlað, vórðu einans 31 støðir tiknar. Um nøgdin í kg pr. støð verður samanborin við í fjør, so er nøgdin av blálongu, trantkongafiski og kubbuta langasporli nakað størri og nøgdin av gulllaksi, brosmu, stinglaksi og svartkalva nakað minni. Eins og undanfarin ár varð gýtandi gulllaksur fingin.




**Mynd 1.** Yvirlit yvir støðir á túri 2040.

**Talva 1**. Veiða, nytrur, magar og tal av støðum per slag

| Fiskaslag | Kg í alt | Nytrur | Magar | Tal av støðum |
|---|---|---|---|---|
| HAVMÚS | 2320.333 | | | 19 |
| TRANTKONGAFISKUR | 2309.078 | 125 | 13 | 20 |
| SVARTKJAFTUR | 2237.828 | 15 | | 23 |
| LÍTLI KONGAFISKUR | 1683.534 | 5 | 1 | 17 |
| STÓRI KONGAFISKUR | 1054.464 | 36 | 1 | 14 |
| GULLLAKSUR | 822.400 | 200 | 39 | 26 |
| GÓMAHOLSHÁVUR | 759.954 | | | 3 |
| KJAFTSVARTI KONGAFISKUR | 448.267 | | | 17 |
| BLÁLONGA | 445.081 | 82 | 33 | 25 |
| SKRUBBHÁVUR | 356.900 | | | 10 |
| LONGA | 223.050 | 19 | 6 | 6 |
| HAVTASKA | 209.965 | 15 | 6 | 10 |
| KUBBUTA LANGASPORL | 177.900 | 5 | 3 | 7 |
| NEVHÁVUR | 132.750 | | | 6 |
| BÚKSVARTI HÁVUR | 121.873 | | | 9 |
| TINDASKØTA | 117.887 | | | 5 |
| HALAHVASSA SKØTA | 109.570 | | | 3 |
| SVARTKALVI | 83.619 | 24 | 13 | 5 |
| STINGLAKSUR | 70.599 | 20 | 1 | 5 |
| MORA | 69.682 | | | 6 |
| LÍTLA BROSMA | 67.928 | | | 5 |
| AGNHØGGUSLOKKUR | 64.157 | | | 10 |
| GLÍGGJHÁVUR | 44.010 | | | 3 |
| BROSMA | 30.530 | 12 | 3 | 7 |
| HVÍTASKØTA | 28.875 | | | 3 |
| SLÆTTHØVD | 27.148 | | | 4 |
| UPSI | 25.735 | 3 | 3 | 3 |
| TOSKUR | 20.095 | 3 | 1 | 2 |
| BLÁRIDDARI | 14.989 | | | 9 |
| BLÁGÓMUR | 13.775 | | | 1 |
| KJAFTSVARTI HÁVUR | 12.460 | | | 3 |
| KLINGRUSKØTA | 11.015 | | | 4 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| SVARTBLETTUTA LANGASPORL | 10.838 | | | 2 |
| ÚLVFISKUR | 7.791 | | | 2 |
| KIKARAFISKUR | 7.761 | | | 3 |
| FJAÐURFAGRA HAVMÚS | 5.514 | | | 2 |
| SANDSKØTA | 4.130 | | | 1 |
| SVARTFISKUR | 3.980 | | | 2 |
| HÝSA | 3.331 | 4 | 4 | 1 |
| COLLETTS BÚKSVARTI HÁVUR | 2.445 | | | 1 |
| HÁVUR | 2.085 | | | 1 |
| TINDABAK | 2.060 | | | 1 |
| LÁLLA | 1.562 | | | 2 |
| REYÐA HORNABROSMA | 1.361 | | | 1 |
| BOA-DREKAFISKUR | 1.173 | | | 4 |
| RÍSNA LANGASPORL | 1.133 | | | 1 |
| RONDSVARTI HÁVUR | 1.096 | | | 1 |
| HEKSAKRABBI | 0.685 | | | 2 |
| LÍTLIGLÁMUR | 0.573 | | | 3 |
| SNÍPUÁLLUR | 0.495 | | | 3 |
| HVASSASPREK | 0.469 | | | 1 |
| GUNTERS LANGASPORL | 0.417 | | | 5 |
| KLÆNASPORL | 0.327 | | | 3 |
| MJÁI PRIKKAFISKUR | 0.223 | | | 3 |
| SILVURMURTUR | 0.214 | | | 2 |
| SMÁTINDABAK | 0.208 | | | 1 |
| LAKSATOBIS | 0.059 | | | 2 |
| MJÁANGI | 0.053 | | | 1 |
| MJÁIKJAFTUR | 0.033 | | | 1 |
| LJÓSANGI | 0.032 | | | 1 |
| LAKSSILD | 0.001 | | | 1 |
| YMIST(ostur, skrambul v.m) | 40.580 | | | |
| Tilsamans | 18301.648 | 568 | 130 | 31 |

**Viðmerkingar:**. Viðmerkingar (smálutir av ymsum slagi) til túrin eru skrivaðar á imp-útskriftirnar. Myndir av bróskfiski (skøtum) vórðu tiknar. Ymiskir fiskar blivu frystir til Vísindavøkuna 6. nov. 2020.

Lise H. Ofstad og Helga Bára Mohr Vang